**Fundarfrágreiðing frá stýrisfundi 19. november 2014:** J.nr. 02.00 14/00101

| | |
|---|---|
| Dagur: | Mikudagur 19. november 2014 |
| Fundarstaður: | Bókbindaragøta 8 |
| Til staðar: | Herálvur Joensen, stýrisformaður, Jan Mortensen, næstformaður, Tove Bull, Sára Joensen, Gestur Hovgaard(var ikki til allan fundin), stýrislimir, Sigurð í Jákupsstovu, rektari og Jørgen Meitilberg, fyrisitingarstjóri |
| Avboð: | Vibeke Michaelsdóttir og Juanna Joensen |

---

Stýrisformaðurin bjóðaði vælkomin.

**Skrá:**

1. **Fíggjarstøðan 2014** J.nr. 05.00 14/00084

Rektarin legði fram fíggjarstøðuna.
Samlaði raksturin fyrstu 10 mánaðirnar er 59.804 t.kr., og í mun til játtanina eru 17% eftir av játtanini restina av árinum, sum í stuttum merkir, at rakstur ultimo oktober er í javnvág við játtanina.
Ein framskriving av samlaða rakstrinum vísir eitt tó eitt hall við ársenda á -281 t.kr. Tað skal viðmerkjast, at tað er ein afturvendandi trupulleiki at framskriva raksturin í mun til leysalæraraútreiðslur, sum ikki er nóg væl útgreinaðar. Arbeitt verður við at lýsa hesar neyvari og at gera neyðugar raðfestingar, soleiðis at raksturin javnvigar við ársenda.
Fyri at styrkja um neyvleika í budgetteringini, er ætlanin framyvir at gera leysalæraraavtalur fyri tey einstøku skeiðini, soleiðis at hesar avtalur eru grundarlagið fyri budgetteringini.

2. **Fíggjarætlan fyri 2015** J.nr. 05.00 14/00121

Rektarin legði fíggjarætlanina fyri 2015 fram. Meira ein helvtin av hækkaðu játtanini á 2,5 mió.kr. á fíggjarlógini fer til lønarhækking á 1,9%.
Fíggjarætlanin fyri 2015 vísir eitt samlað hall á 1.052 t.kr. Arbeitt verður í løtuni við at útgreina og raðfesta lønar- og rakstrarútreiðslurnar, soleiðis at fíggjarætlanin javnvigar við ætlaðu játtanina.

Tað er umráðandi at neyðugur peningur verður settur av til standardkonto 14 "keyp av vørum og tænastum.", soleiðis at raksturin ikki verður ov trongur. Á fíggjarætlanini fyri 2015 er tað sama avsett til keyp av vørum og tænastum sum í 2014.

3. **Framløga av nýggjum útbúgvingum**

## a. Joint Nordic Masterprogramme; West Nordic Studies-Governance and Sustainable Management

J.nr. 09.00 14/00200

Lau Øfjord Blaxekjær legði fram:
Tey 5 universitetini Háskóli Íslands, Universitetið í Akureyri, Ilisimatusarfiik og Universitetið í Nordland samstarv um at seta í verk ein Jt.Nordic master útbúgving. Talan er ikki um eina joint degree útbúgving við felags prógvi, men um skipan har universitetini úitskriva prógv hvør sær til síni lesandi. Undirvísingin er fyri tað mesta á enskum, hetta er tó treytað av samansetingini av studentunum.
Ætlandi verður størri parturin av útbúgvingini, íroknað BA serritgerðina, í FO og verður írestandi parturin tikin í Íslandi, Grønlandi ella Noregi. Í minsta lagi eitt semestur (30 ECTS) skal takast á øðrum universiteti.

Lesturin verður eftir ætlan skipaður soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 4. lestrarhálva | 30 ECTS - Føroyar<br>Serritgerð | | |
| 3. Lestrarhálva | 10 ECTS – Føroyar<br>Kjarnufak | 10 ECTS – Føroyar<br>Kjarnu- ella valfak | 10 ECTS – Føroyar<br>Kjarnu- ella valfak |
| 2. lestrarhálva | 30 ECTS - Íslandi, Norra ella Grønlandi<br>Valfak | | |
| 1. lestrarhálva | 10 ECTS - Akureyri<br>Innleiðsluskeið | 10 ECTS - Føroyar<br>Kjarnufak | 10 ECTS - Føroyar<br>Kjarnu- ella valfak |

## b. Master í samfelags-, stjórnmálafrøði og søgu (meistaralæra)

Gestur Hovgaard legði fram:
Talan er um ein nýggjan hátt at skipa masternám á Setrinum uppá.
Støðið verður tikið í tí einkulta studentinum, eini: "master-ætlan" heldur enn "útbúgving".
Læringin er bygd upp sum "interaktiv praksislæring" við almennum og individuellum lærumálum.

1. lestrarhálva:
Teoretiskt og metodisk grundlestrarhálva
Kombi av fak-spesifikkum og felagsaktivitetum

2. lestrarhálva:
Uttanlanda-uppihald við fokus á serøki
Alternativ til tey sum ikki fara

3. lestrarhálva:
Phronetikum – metodulæra og "kontaktin við arbeiðsmarknaðin".
Annars sami leistur sum í 1. lestrarhálvu

4. lestrarhálva:
Serritgerð

Framløgan hjá GH bendir á at partar av útbúgvingini kann samskipast við Jt. Nordic masterútbúgvingini.

## c. BSc í búskaparfrøði

Jóannes Jacobsen legði fram:
Uppskotið mælir til fult grundnám í búskaparfrøði, sum setir tey lesandi før fyri at fara undir framhaldslestur á master/kandidatstigi til breitt úrval av búskaparligum, sosialum og vinnuligum útbúgvingum. Endamálið við bachelorútbúgvingini er at bjóða eina fakliga djúptøkna útbúgving innan týðandi samfelagslig og virkisbúskaparlig evnir.
Grundnámið verður sett saman av trimum ymiskum evnisgeirum: tjóðarbúskap, virkisbúskap, støddfrøði, og kvantitativari háttalæru.

Ítøkiliga endamálið við bachelorútbúgvingini í búskapi er, at
1) Geva studentinum innleiðslu í virkis- og samfelagsbúskaparligu vísindagreinarnar, undir hesum virkisbúskaparlig og samfelagsbúskaparlig ástøði og háttaløg, so studenturin fær breiða fakliga vitan og førleikar
2) Geva studentinum fakliga vitan, ástøðiligar førleikar og førleikar í vísindaligum háttaløgum, so studenturin gerst førur fyri sjálvstøðugt at eyðmerkja, lýsa og loysa torgreiddar samfelags- og virkisbúskaparligar spurningar
3) Gera studentin virkisføran í privatum og almennum størvum
4) Gera studentin skikkaðan til upptøku á masterútbúgvingum, harundir masterútbúgving í búskaparfrøði

Miðað verður eftir at taka lesandi inn á hvørjum ári.

## d. Bachelor í løgfrøði

J.nr. 09.00 14/00177

Bárður Larsen legði fram:
MA útbúgvingin í løgfrøði, sum hevur verið boðin út á Setrinum hevur gingið væl. Føroysk lesandi, sum hava tikið BA í løgfrøði á øðrum universitetum, eru tó ikki enn flutt til Føroyar fyri at taka MA í løgfrøði á Setrinum. Ein bachelor útbúgving í løgfrøði á Fróðskaparsetrinum fer at geva fleiri fólkum møguleika at fara undir løgfrøði og sum frálíður eitt støðugt grundarlag undir masterútbúgving og gransking í løgfrøði.

Endamálið við bachelorútbúgvingini er at geva studentinum førleikar í at finna, fata og greina lóg og løgfrøði alment við útliti til at gerast málsviðgeri ella fara undir masternám.

Talan er um eina løgfrøðiliga bachelorútbúgving á 180 ECTS. Upptøkutreytin er miðnámsútbúgving ella samsvarandi.

Endamálið við útbúgvingini er at geva studentinum førleikar í løgfrøði.
Tann útbúni skal kunna taka við størvum sum málsviðgeri í almennari og privatari fyrisiting, har kravið er kunnleiki til løgfrøði og málsviðgerð. Tann lesandi fær við hesi útbúgving førleika at fara undir masternám í lóg í Føroyum ella aðrastaðni.

Tann útbúni skal við at taka master eisini kunna starvast sum løgfrøðingur í øllum siðbundnum størvum.

**e. BS.c. í Orkuverkfrøði**

Bogi Bech Jensen legði fram uppskot um broyting av bachelorútbúgvingini "Orku- og umhvørvisverkfrøði", ið varð sett í verk í 2013. Nýggja útbúgvingin fær heitið "Orkuverkfrøði" og er nú talan er um eina bachelorútbúgving á 210 ECTS, har lesandi eru í starvslæru í eitt hálvt ár. Ávís fak, (støddfrøði og hagfrøði) verða tikin inn í útbúgvingina frá DTU. Hetta hevur verið roynt í lestrarárinum 13/14, og ætlanin er, at tá ein tíð er fráliðin, at eftirmeta hesa skipanina

Endamálið er at geva studentinum eina generella vitan innan náttúruvísindi, og at geva studentinum eitt breitt grundstøði innan orkuverkfrøði, sum ger studentin føran fyri at virka innan verkfrøði ella at fara undir víðari masternám.

**f. 30 ECTS-nám fyri sóknarprestar í føroysku fólkakirkjuni**

Jákup Reinert Hansen legði fram:
Sambært ll. nr. 48 frá 10. mai 2013 um størv í fólkakirkjuni § 2, stk. 1 skulu prestar hava lært nám í føroyskari kirkjusøgu, skipan, siðum og embætisførslu, áðrenn tvey ára starvstíð er lokin. Hetta er eitt av trimum kravdum skeiðum á tilsamans 30 ECTS.

Ætlanin er at bjóða eitt 10 ECTS skeið í liturgikki og hymnologi á vári 2015.
Skeiðið er í fyrsta umfari hugsað til prestar. Men komandi skeið sum t.d. kirkjusøga kann bjóðast út sum MA skeið til lesandi á Setrinum.

Skeiðið er serliga ætlað prestum í fólkakirkjuni og lesandi, sum útbúgva seg til hetta starv og hava lokið bachelorprógv í gudfrøði. Eisini onnur við hóskandi bachelorprógvi ella samsvarandi útbúgving og arbeiðsroyndum kunnu søkja um upptøku.

Eftir framløgum av útbúgvingum varð tosað um hvussu samvirkandi fyrimunir kunnu fáast millum útbúgvingar, t.d. við at sama fak verður partur av tveimum útbúgvingum. Nevnt varð at slíkir spurningar kundu verið viðgjørdir millum útbúgvingarleiðarar, sum so kunnu finna møgulig samstarvsøki.. Talan kann bæði verða um felagsundirvísing ella tvørfakligar verkætlanir. Ítøkiliga varð møguleikin fyri samstarvi millum Jt. Nordic masterútbúgvingini og masterlæruna í samfelags-frøði nevndur.

Stýrið skifti orð um, hvørjir møguleikar eru fyri at seta nýggjar útbúgvingar í verk, tá ið hugsað verður um avmarkaða vøksturin í fíggjarjáttanini. Nakað kann gerast, m.a. við samskipan, tvørfakligari undirvísing og umraðfestingum. Havandi avmarkaðu fíggjarkarmarnar í huga, heitti stýrið á leiðsluna um at gera eitt raðfest uppskot til, hvørjar nýggjar útbúgvingar Fróðskaparsetrið skal bjóða út í 2015.

Uppskotið frá leiðsluni verður viðgjørt á komandi stýrisfundi, sum verður í februar 2015. Avgerð má takast á fundinum, tí útbúgvingarnar, sum verða bodnar út í 2015, skulu marknaðarførast.

**4. Uppfylging av málum frá stýrisfundi 18.09.14**

a. **Stýrið heitti á leiðsluna um at gera yvirlit yvir kostnaðin pr. lesandi fyri tíðarskeiðið 2009 til 2014.**

Rektarin legði fram yvirlit yvir kostnað pr. lesandi fyri tíðarskeiðið 2009 til 2014.

| Kostnaður fyri hvønn lesandi á Fróðskaparsetur Føroya | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Roknskapur 2008** | **Roknskapur 2009** | **Roknskapur 2010** | **Roknskapur 2011** | **Roknskapur 2012** | **Roknskapur 2013** | **R mettur 2014** |
| Kostnaður pr fíggjarár* | 56.231 | 61.815 | 65.365 | 67.786 | 68.515 | 67.182 | 71.752 |
| Lesandi | 457 | 434 | 531 | 489 | 557 | 618 | 657 |
| **Miðal kostnaður pr lesandi** | **123** | **142** | **123** | **139** | **123** | **109** | **109** |
| | | | | | | | |
| * íroknað útr viðv Granskingardeplinum | | | | | | | |

Yvirlitið, sum skal takast við fyrivarni, vísir, at kostnaðurin pr. student er fallin munandi seinastu árini.

b. **Jt Nordic Master: Endalig samstarvsavtala skal sendast stýrinum til kunningar/góðkenningar millum funda.** J.nr. 09.00 14/00200

Avtalan er ikki heilt klár enn, og kann tískil ikki leggjast fyri stýrið. Tá avtalan er klár at undirskriva, verður hon send stýrislimunum til góðkenningar millum funda.

c. **Stýrið heitti á leiðsluna um at raðfesta samfelagslig masternám, soleiðis at hesi lestrartilboðini eru klár at taka við, tá ið lestrartilboðini fyri 2015 verða lýst.**

Sí punkt 3.

d. **Trivnaðarkanningin - bøtandi átøk: Stýrið vildi hava eina kunning um gongdina í málinum á skrá til næsta stýrisfund.** J.nr. 04.02 13/00036

Fyrisitingarstjórin kunnaði um, at arbeiðið við at dagføra starvslýsingarnar hjá deildarskrivarunum og skrivarunum gongur væl. Starvslýsingarnar verða greiðari hvør sær, og tær eru í tráð við lýsingina av deildarskrivstovunum og hildnar starvsfólkasamrøður. Starvsfólkasamrøðurnar ganga somuleiðis væl, men hava tikið longri tíð enn væntað.

Í løtuni verður arbeitt við at orða "øktar heimildir" til deildarskrivstovurnar. Arbeitt verður somuleiðis við at orða mannagongdir fyri HR-økið.

Tríggjar mannagongdir eru góðkendar á leiðslufundi og lagdar út á heimasíðuna undir http://setur.fo/um_setrid/regluverk/. Mannagongdirnar eru: móttøka av nýggjum starvsfólki, journalskipan og leiga av hølum á Fróðskaparsetri Føroya. Í løtuni verður síðsta hond løgd á mannagongdir fyri setanarpolitikk, merkisdagar og eldrapolitikk.

Kunnað varð um, at Johnhard Klettheyggj skipar fyri skeiði í fyrisitingarreglum mánadagin 24. november. Skeiðið snýr seg um fyrisitingarlógina í síni heild, men eisini um journalisering, persónsupplýsingarreglur (hvussu handfara vit viðkvæmar upplýsingar um lesandi og starvsfólk), notatskyldu v.m.
Somuleiðis er farið undir at bjóða øllum starvsfólkum eina røð av telduskeiðum í Office 2010. Fyrsta skeiðið er í Outlook, sum er teldupost- og kalendaraskipanin

hjá Setrinum. Á skeiðnum kunnar KT leiðarin um nýggja KT pallin og fjaratgongd.

Starvsfólkaumboð gjørdi vart við, at tíðarætlanin heldur ikki, og arbeiðið gongur ov seint.

Gjørt varð vart við, at tað enn er eitt sindur ógreitt, hvussu ávísar uppgávur verða loftaðar í nýggja bygnaðinum, m.a. tí deildarskrivarar hava tilvísingar til bæði dekanar og fyrisiting. Stýrið mælti til, at dekanarnir av og á taka lut á skrivarafundum fyri at umrøða ivamál.

Starvsfólkaumboð gjørdi vart við, at tíðarætlanin heldur ikki, og arbeiðið gongur alt ov seint.

## 5. Endalig góðkenning av strategi

Strategiskjalið hevur verið til hoyringar. Svar er móttikið frá FMD, NVD, NÁD Setursskrivstovuni, og frá starvsfólki. Strategiskjalið hevur somuleiðis verið lagt fram fyri Mentamálaráðnum (16 sept) og Vinnuhúsinum (24 sept).

Stýrið góðkendi og staðfesti strategiina. Næsta stigi er at fáa skjalið endaliga rættlisið og marknaðarført.

## 6. Kunning og umrøða

### a. Akademiska ráðið — J.nr. 02.99 14/00171

Rektarin hevur kallað Akademiska Ráðið inn til fyrsta fundin 27. november 2014.

### b. Lestrarráðini — J.nr. 02.04 14/00170

Lestrarráðini eru loksins mannaði, men Setrið hevur ikki fingið endaligu nøvnini frá Ráð Teirra Lesandi enn. Tá øll nøvnini eru komin til høldar, verður kunnað um hvussu lestrarráðini og akademiska ráðið er mannað. RTL hevur fráboðað, at vali av umboðið fyri lesandi í stýrið verður avgreitt fyri jól.

### c. Starvssetanir

Einki nýtt starv sett síðani seinasta stýrisfund.

### d. Kampus

Tørvsmeting skal bjóðast út eftir almennum galdandi reglum.

### e. Menningarsáttmáli

Fundur er avtalaður við Mentamálaráðið har endamálið er at umrøða møguligan leist fyri menningarsáttmála millum landsstýrismannin og stýrið fyri Setrið, eins og ásett er í reglugerðini fyri stýrið.

### f. Staðarnavnanevndin — J.nr. 02.99 14/00234

Mentamálaráðið hevur heitt á stýrið um at velja umboð til staðarnavnanevndina. Føroyamálsdeildin hevur mælt til at velja Eyvind Weihe, Anfinn Johansen og Lenu Reinert í staðarnavnanevndina. Stýrið tók undir við tilmælinum frá Føroyamálsdeildini.

**7. Næsti fundur verður mikudagin 18. feburar 2015.**

Stýrisfundirnir fyri árið 2015 liggja soleiðis:

Mikudagur 18 februar
Hósdagin 28. mai
Hósdagin 17. september
Mikudagin 18. november

*fyrisitingarstjórin*